# NEVERLAND ER STONGT

Stóra Neverland Ranch hjá Michael Jackson er latin aftur. Starvsfólkið fekk í farnu viku endiliga lønina, ið Jackson skyldaði teimum fyri fleiri mánaðar. Samstundis vóru tey send til hús. Talsfólkið hjá Michael Jackson sigur, at av tí, at Jackson nú býr í Bahrain, hevur hann avgjørt at senda starvsfólkið á Neverland til hús. Tað er tó almenn vitan, at starvsfólkið er sent heim av myndugleikunum, tí Jackson ikki hevur goldið arbeiðsloysistryggingina fyri starvsfólkini, skrivar Billboard.com. Fólkið, ið ansar djórunum hjá Michael Jackson er enn til arbeiðis, men tað kemst av, at ein djóralækni í grannalagnum hevur sett tey í starv hjá sær.



Michael Jackson er fluttur til Bahrain, eftir at enn eitt sakarmál um kynsligan ágang móti børnum er av.



Stóra Neverland Ranch hjá Michael Jackson er hansara egna Tivoli. (mynd: Scanpix.dk)

## HITLIST

**15 tær bestu** — ÚF

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Høgni Lisberg | Learn To Ride On Waves |
| 2 | Petur Pólsson | Fremmandur |
| 3 | Robbie Williams | Advertising Space |
| 4 | Makrel | Filthy Tongue |
| 5 | Pink | Stupid Girls |
| 6 | Kelly Clarkson | Because Of You |
| 7 | Black Eyed Peas | My Humps |
| 8 | Madonna | Sorry |
| 9 | Kent | Dom som försvann |
| 10 | The Pussycat Dolls | Beep |
| 11 | Poppkorn | Droymi Mitt Um Dagin |
| 12 | James Blunt | Goodbye My Lover |
| 13 | Maria Mena | Just Hold Me |
| 14 | Villmenn | Cyberspace |
| 11 | Mew | Special |

**Tjeklisten** — DR

| | | |
|---|---|---|
| 1 | UFO Yepha | Op me håret |
| 2 | Madonna | Sorry |
| 3 | Anden | FAQ |
| 4 | Kelly Clarkson | Because Of You |
| 5 | Spleen United | Spleen United |
| 6 | Mew | Special |
| 7 | Kashmir | The Cynic |
| 8 | Sugababes | Ugly |
| 9 | Pink | Stupid Girls |
| 10 | Arctic Monkeys | When The Sun Goes Down |
| 11 | Magtens Korridorer | Nordhavn Station |
| 12 | Outlandish feat. USO | Kom Igen |
| 13 | Depeche Mode | Suffer Well |
| 14 | Marie Key Band | Kleptoman |
| 15 | TV-2 | De Første Kærester på Månen |
| 16 | Jakob Sveistrup | Book Of Love |
| 17 | Bob Sinclair ft. G. Pine | Love Generation |
| 18 | James Blunt | Goodbye My Lover |
| 19 | Peter Sommer | Man hamrer løs på åben en dør |
| 20 | Laleh | Live Tomorrow |

**Top of the Pops** — BBC

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Orson | No Tomorrow |
| 2 | It's Chico Time | Chico |
| 3 | Black Eyed Peas | Pump It |
| 4 | Pussycat Dolls ft. Will I Am | Beep |
| 5 | Corinne Bailey Rae | Put Your Records on |
| 6 | Girls Aloud | Whole Lotta History |
| 7 | Sugababes | Red Dress |
| 8 | Kanye West ft. Lupe Fiasco | Touch The Sky |
| 9 | Madonna | Sorry |
| 10 | Meck ft. Leo Sayer | Thunder In My Heart Again |
| 11 | Joey Negro | Make A Move On Me |
| 12 | Feeling | Sewn |
| 13 | Ray J | One Wish |
| 14 | Notorious BIG, Diddy & Nelly | Nasty Girl |
| 15 | Michael Jackson | Beat It |
| 16 | Beverly Knight | Piece Of My Heart |
| 17 | Massive Attack | Live With Me |
| 18 | Ne-Yo | So Sick |
| 19 | The Source ft. Candi Staton | You Got The Love |
| 20 | Hillary Duff | Fly |

**Billboard** — Billboard

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Ne-Yo | So Sick |
| 2 | Sean Paul | Temperature |
| 3 | James Blunt | You're Beautiful |
| 4 | Mary J. Blige | Be Without You |
| 5 | Daniel Powter | Bad Day |
| 6 | T-Pain ft. Mike Jones | I'm N Luv |
| 7 | Natasha Bedingfield | Unwritten |
| 8 | Beyonce ft. Slim Thug | Check On It |
| 9 | Dem Franchize Boys og onnur | Lean Wit It, Rock Wit it |
| 10 | Chris Brown | Yo(Excuse Me Miss) |
| 11 | Nelly og onnur | Grillz |
| 12 | Cascada | Everytime We Touch |
| 13 | Eminem ft. Nate Dogg | Shake That |
| 14 | Bubba Sparxxx og onnur | Ms. New Booty |
| 15 | Jamie Foxx ft. Ludacris | Unpredictable |
| 16 | Pussycat Dolls ft. Will I Am | Beep |
| 17 | Fall Out Boy | Dance, Dance |
| 18 | Busta Rhymes | Touch It |
| 19 | Kelly Clarkson | Because Of You |
| 20 | Carrie Underwood | Jesus, Take The Wheel |

sound

# STEVEN TYLER HEVUR HVØRKI FUGLAKRÍM ELLA HÁLSKRABBA

Aerosmith hava fyribils avlýst seks konsertir av teirra konsertferð, tí sangarin Steven Tyler hevur mist røddina. Hetta hevur fingið fólk at gita ymiskt og hvat, m.a. hava søgur gingið um, at tann 60 ára gamli sangarin hevur fingið krabbamein í hálsin, summi hava somuleiðis gitt um, at talan var um fuglakrím. Men hetta avváttar plátufelagið hjá Aerosmith nú, skrivar The Boston Herald. Blaðið hevur keldur, ið hava sætt sangaran til handils. Hann hevði onkran við sær, ið bilegði vørurnar fyri hann, soleiðis at hann slapp undan at tosa. Men ein sera hásur Steven Tyler segði sjálvur sølukonuni, at hon hevði vøkur eygu.



Steven Tyler syngur ikki nógv í løtuni, hansara 60 ára gamla rødd er hás og verður tí hvíld. mynd: aerosmith.com)

# NÚ SKAL MORÐIÐ Á NOTORIOUS B.I.G. KANNAST



Notorious B.I.G. var skotin í 1997

Morðið á kenda rapparan Notorious B.I.G. skal nú kannast av nýggjum. Eitt nýtt kanningarlið er sett at kanna málið, aftan á at ein dómari hevur avgjørt, at løgreglan í Los Angeles goymdi prógv í fyrru kanningini. Mamma rapparan og einkjan eftir hann Faith Evans hava ákært óargarligar løgreglumenn fyri saman við Death Row plátufelagsstjóranum Marion Suge Knight at hava dripið B.I.G. Hetta verður nú millum annað kannað. Løgreglan í Los Angeles er somuleiðis dømd at gjalda $1,1 millión fyri sakarkonstnaðin, skrivar Gaffa.dk.

# JUPITER OG MARS FRÁ RED HOT CHILI PEPPERS

Red Hot Chili Peppers geva 9. mei nýggja fløgu út. Talan verður um eina dupulta fløgu við ikki færri enn 25 nýskrivaðum løgum. Fløgurnar verða útgivnar saman undir heitinum Stadium Arcadium, men eita hvør sær Jupiter og Mars. Ætlanin var upprunaliga at geva 38 løg út á trimum fløgum, men nú eru 13 løg skorðin burtur og talan er bara um eina dupulta fløgu. Fyrsta stakfløgan "Dani California" verður givin út 1. mei. Hetta er fyrsta útgávan hjá Chili Peppers síðan By The Way, ið kom út í 2002. Eitt brot av fyrstu stakfløguni liggur á heimasíðuni www.redhotchilipeppers.com.




Hetta er fløguhúsin, men tað, ið er innan í, mugu vit bíða til 9. mei við at síggja.